**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1322**
**Tíðarskeið 15/5-20/5-2013**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Karin Margretha H. Larsen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar og at taka fortoyingar upp. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av NACLIM verkætlanini.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og útgerð at taka fortoyingar upp við.

**Um túrin:** Vit fóru út mikukvøldið 15/5 kl. 1900. Siglt varð suður í Hestsfjørð, har vit byrjaðu at taka ein CTD-skurð norður gjøgnum fjørðin og síðan í ein útsynning yvir lítlu rammu og út til aldumátaran hjá Landsverki. Síðan sigldu vit á skurð V, ið varð tikin frá Sandoynni og út á Føroya Banka. Hetta var liðugt á middegi hósdagin og haðani varð siglt til fortoyingina í Bankarennuni. Hon bleiv tikin upp í øllum góðum. Leiðin gekk so til skurð M, ið bleiv tikin inn móti Mykinesi og síðan varð hildið fram eftir skurði R út á Íslandsryggin. Hetta var liðugt fríggjamorgunin 17/5.
Siglt varð so eystur á norðastu boyu á norðurskurðinum, har tvær boyur og tvær rammir eru. Onki samband fekst við NWNG og eftir uml. ein tíma góvust vit at leita á leiðini. Síðan fingu vit NWNB upp í øllum góðum. Vit steðgaðu á við NWNE, ið ikki kom upp í fjør. Samband fekst framvegis við annan releasarin, men ramman kom ikki upp. At enda fingu vit eisini rammu NWNA upp, tó at ramman kom heldur harðliga upp gjøgnum sliskuna og inn á trolbanan. Spælið hivaði av einhvørji orsøk sjálvt, og tað er ógreitt, hvør feilurin var. At síggja til fekk ramman tó ongan skaða.
Nú gekk leiðin til Høgnaboða, hagar vit komu seint fríggjakvøldið og tóku vit síðan skurð E eystureftir. Hetta var liðugt á middegi leygardagin og sigldu vit síðan til Munkagrunnin. Á vegnum løgdu vit stilt í tríggjar tímar vegna brek á róðurmaskinuni. Út móti midnátt leygarkvøldið komu vit á støð S01 og tóku vit síðan skurð S suðureftir. Tríggjar boyur og ein ramma vóru á skurðinum og hesar blivu tiknar upp á veg norður aftur – tað gekk væl og allar komu inn í øllum góðum. Síðan var siglt á Havnina hagar vit komu mánanáttina 20/5 kl 0030.
Undantikið áðurnevnda trupulleika, tá ramma NWNA bleiv tikin upp, gekk alt væl og alt riggaði, sum tað skuldi. Veðrið var fyri tað mesta gott allan túrin.
Lítil gróður var at síggja á Landgrunninum og vestanfyri, men úti á bankunum eystanfyri var fitt av gróðri. Ein grind var at síggja á skurði S.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 67 støðir og saltprøvar á teimum flestu støðunum. Við WP2 glúpinum tóku vit 46 støðir. Vit tóku 7 ADCP-ir (streymmátarar) upp.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst.

**Viðmerkingar:**

21-05-2013

Karin Margretha H. Larsen og Regin Kristiansen



Kósir og støðir á túri 1322